## Føroyskur barnadansur í Skansastovu

Aftur í ár skipar Dansifelagið »Tøkum Lætt« fyri barnadansi fyri børnum í øllum aldri. Byrjað verður mikukvøldið tann 24. oktober í Skansastovu, Djón í Geil gøta 1. Dansað verður frá kl.19 til 20. Øll eru vælkomin, sigur nevndin í Tøkum Lætt.



## Tingfólk skulu nú gjalda kontant

Tingfólk, landsstýrisfólk, løgmaður og onnur, sum starvast í løgtinginum, sleppa ikki longur at keypa upp á borg í kantinuni í løgtinginum. Hetta ger Súsanna Danielsen, stjóri í løgtinginum, greitt í brævi til tingfólk. Hon ger eisini greitt, at tað heldur ikki fer at bera til at gjalda við gjaldskorti – nú skal gjaldast kontant! Um talan er um vantandi kredittvirði hjá tingfólki, meldar søgan kortini einki um, men tey verða so noydd at hava reiðan pening, tørvar teimum ein kaffimunn...

# Nólsoy áhugaverdur møguleiki

**Í løtuni eru kanningar í gongd sum skulu vísa, um Nólsoy typografiskt er egnað at byggja flogvøll á. Er hetta so, er uppskotið avgjørt ein áhugaverdur møguleiki, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður**

FLOGVØLLUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm heldur avgjørt. at Nólsoyggin er áhugaverd, men lendisviðurskiftini eru avgerandi fyri, hvar nýggjur flogvøllur skal byggjast*

Í kjalarvørrinum av uppskotinum hjá Magnusi Hansen um flogvøll í Nólsoy, hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Bjarni Djurholm, biðið Landsverk um at gera kanningar av oynni.

Avgerandi er, um Nólsoy typografiskt er egnað at byggja flogvøll á, og um so er eigur eisini at verða tikið við, at ein undirsjóvartunnil má gerast, tí tað er ikki hugsingur um at flyta fólk um fjørðin við ferju.

\- Nólsoyggin er sera áhugavert øki, ikki minst tí at veðurmátingar eru gjørdar har í mannaminnir. Hesar mátingar saman við vitan hjá lokalum fólki vísa, at vindviðurskiftini eru sera støðug, og tí verður hetta øki tikið í fullum álvara, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin vísir annars á, at veðurkanningar vanliga taka eini trý ár, men hetta skuldi so ikki verið neyðugt í Nólsoy, tí kanningar hava verið gjørdar har í fleiri mansaldrar.

Røddir hava eisini verið frammi um, at Svínoyggin kundi verið eitt áhugavert stað at leggja ein flogvøll, men eins og onnur uppskot verður í tí førinum eisini talan um ein flogvøll við einari breyt og ikki sum í Nólsoy við krossbreyt. Og hetta verður av flogskiparum mett at vera ein avgjørdur fyrimunur.

### Í 2015 í fyrsta lagi

Tað er norska fyritøkan Asplan Viak AS, sum ger kanningarnar, og danska Rambøll hevur og skal síðani eftirmeta kanningarnar. Harumframt skal ein bólkur gera eina »second opinion« fyri at metingarnar skulu verða so greiðar sum tilber.

Við í metingunum er eisini undirsjóvartunlar til Svínoy ella Nólsoyar, umframt at roknað verður við, at ein slíkur eisini verður gjørdur út í Sandoynna.

Mett verður, at ein slíkur tunnil til Svínoyar fer at kosta einar 350 milliónir, meðan ein tilsvarandi tunnil til Nólsoyar fer at liggja um 600 milliónir.

Verður roknað við vindmátingum í eini tvey til trý ár, eitt til tvey ár at gera verkætlan og eini trý til fýra ár at byggja, kann ein nýggjur flogvøllur í fyrsta lagi standa klárur um ár 2015.

Áðrenn Nólsoyggin kom upp á tal vóru mest sum bara tvey alternativir, hugsað var um, nevniliga Søltuvík á Sandoynni og Glyvursnes. Skorðhæddin í Eysturoy var eisini upp á tal, men bæði Asplan Viak og Rambøll mæla frá at byggja flogvøll har. Seinni er eisini komið fram, at Skúvoyarfjørður er herviligur til turbulens, og út frá tí tykist ikki skilagott at leggja ein flogvøll í Søltuvík.

Tá talan er um prís metir landsstýrismaðurin, at best egnaða staðið eigur at verða funnið, og at nakrar milliónir hendan ella handan vegin ikki er so avgerandi, ikki minst tá hugsað verður um, at ein slík íløga skal vara fleiri árhundraðir inn í framtíðina.

# Skráseting av Spron kann ávirka Eik

**Týsdagin 23. oktober verður íslendska felagið Spron skrásett á virðisbrævamarknaðinum. Eik banki eigur 8,45 prosent í Spron, og møguligi vinningurin hjá Eik kann gerast millum 200 og 700 milliónir krónur**

BØRSSKRÁSETING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Sambært analysu hjá Føroya Banka fer Eik at forvinna millum 200 og 700 milliónir nú Spron verður børsskrásett*

Íløgudeildin hjá Føroya Banka vísti í juli á, at tað kundi fáa týðandi ávirkan á ársúrslitið hjá Eik banka, um Spron varð børsskrásett. Nú børskrásetingin verður veruleiki, hevur íløgudeildin hugt at, hvørja ávirkan skrásetingin kann fáa á Spron og Eik.

Ognarparturin hjá Eik í Spron er bókaður til keypsupphæddina 240 mió. krónur í roknskapinum. Hendan upphæddin skal virðisjavnast og munurin síðan inntøkuførast hjá Eik, tá Spron er skrásett á virðisbrævamarknaðinum. Íløgudeildin metir, at marknaðurin longu hevur innroknað ein stóran vinning í verandi prísáseting av Eik. Tó valdar óvissa um, hvussu stórur vinningurin er.

Síðan Spron varð umlagt til partafelag í august, hevur ikki verið gjørligt at handla Spron-partabrøv umvegis heimasíðuna hjá felagnum. Ráðgevarafyritøkan Capacent gjørdi tó fyri Spron eina almenna virðisáseting av partabrøvunum, ið ásetti virðið til 60 milliardir íslendskar krónur. Hetta gevur Eik ein vinning á 200 milliónir føroyskar krónur.

Hinvegin varð ábyrgdarpeningurin í august handlaður fyri ein kurs, ið ásetti virðið á Spron oman fyri 100 milliardir íslendskar krónur. Um hetta verður virðið, tá Spron fer á børsin, fær Eik ein vinning á umleið 700 milliónir krónur.

### Samanbundin feløg

Meginparturin av virðisøkingini hjá Spron seinastu árini stavar frá ognarlutinum í Exista. Spron eigur 6,72 % í Exista, Exista eigur 23,03 % í Kaupthing Bank, og Kaupthing Bank hevur havt stóra framgongd seinastu árini. Eik eigur 8,45% í Spron, og Spron eigur hinvegin 1% í Eik.

Gongdin hjá Exista hevur tó síðan seinastu greiningina hjá Føroya Banka av Eik verið negativ. Hetta talar fyri, at kursurin hjá Spron verður ikki so høgur, sum mett hevur verið. Tó hevur Spron seinastu tíðina selt meginpartin av sínum ognarluti í Icebank og inntøkuført ein vinning á 3,2 mia. íslendskar krónur. Hetta kann fáa positiva ávirkan á Spron-partabrævið.

Tá Capacent ásetti virðið á Spron til 60 milliardir íslendskar krónur, tók Capacent støði í grundleggjandi viðurskiftunum í fyritøkuni sum inntjening, ognir og vakstrarmøguleikar. Tó tykist tað, sum at viðurskifti sum strategisk positionering millum íslendsku sparikassarnar og aðrar bólkar av íleggjarum vóru við til at trýsta prísin á ábyrgdarpeninginum hjá Spron væl hægri upp.

Spurningurin er so, um hesi viðurskifti framhaldandi fara at gera seg galdandi, ella um tey meira grundleggjandi fíggjarligu viðurskiftini aftur fara at áseta virðið á fyritøkuni, skrivar Føroya Banki á heimasíðu síni.